# Klárt at velja bisp

Nú er greitt, at tað verður annaðhvørt Poul Joachim Stender ella Peter Fischer-Møller, sum skal taka við sum biskupur í Roskilde aftan á Jan Lindhardt, sum fer frá fyri aldur tann 1. mai. Neyðugt var tó við umvali fyri at finna tey bæði seinastu valevnini, tí tað vísti seg, at á fyrra valinum, sum var tann 1. februar, vóru fleiri atkvøður enn fólk, sum høvdu loyvi at atkvøða. Avgerðin um, hvør skal hava biskupsembætið, fellur tann 3. apríl.



*Poul Joachim Stender verður kanska biskupur í Roskilde*
*(Mynd. DR)*

# Fiskiflotin minkar

Íslendski fiskiflotin minkar í hvørjum - í hvussu er í tali. Sambært skipaskránni vóru 1.642 fiskifør skrásett í Íslandi nýggjársaftan, og tað var umleið 50 færri enn eitt ár frammanundan. Motorskipini vóru 834 í tali ella 18 færri enn fyri einum ári síðani, og trolararnir vóru 64 í tali ella ein fleiri enn nýggjársaftan í 2006. Teir opnu bátarnir, sum verða brúktir til fiskiskap, eru eisini í skrásetingini. Teir vóru 744 í tali nú um ársskiftið.



*Í Føroyum eru nógvir útlendskir kommunulæknar, sum ikki kenna landið nóg væl. Tí verða ov nógvir sjúklingar sendir á Landssjúkrahúsið, men her skal broyting koma í, sigur landsstýrismaðurin*

# Senda ov nógv fólk á Landssjúkrahúsið

**Nýggja vaktarskipanin hjá kommunulæknunum virkar stak væl, men ábøtur skulu gerast, so at færri sjúklingar verða sendir á Landssjúkrahúsið, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður**

KOMMUNULÆKNASKIPAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nýggja vaktarskipanin hjá kommunulæknunum virkar stak væl.

Tað er niðurstøðan hjá Hans Paula Strøm, landsstýrismanni í almanna- og Heilsumálum, nú tað eru 10 mánaðir síðani, at ein nýggj vaktarskipan varð sett í verk fyri kommunulæknarnar í øllum meginøkinum.

Kortini staðfestir hann eisini at eitt brek við skipanini er, at ov nógvir sjúklingar verða sendir til læknavaktina á Landssjúkrahúsinum.

## Elvir til ótryggleika

Nú hava fólk í øllum meginøkinum eina telefon á Landssjúkrahúsinum at ringja til, tá ið brúk er fyri lækna um kvøldið og um næturnar og annars uttanfyri vanliga viðtalitíð.

Bjørn Kalsø, løgtingsmaður staðfesti í løgtinginum nú ein dagin, at tað eru mong dømi um, at skipanin ikki virkar nóg væl og tað eru eisini nógv dømi um, at tað elvir til ótryggleika úti um landið, tí uttanfyri vanliga viðtalutíð er tað tvørligt at sleppa til lækna í bráðneyðugum ørindum.

Hann segði at nógv dømi eru um, at nýggja skipanin kennist fjar frá brúkarunum og elvir sostatt til ampa og tí heldur hann, at tað hevur skund at endurskoða hana.

## Virkar stak væl

Men Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, er ikki við upp á, at skipanin virkar so illa.

- Yvirhøvur virkar nýggja vaktarskipanin stak væl, sigur hann.

Hann hesar 10 mánaðirnar, skipanin varð sett í verk, hava kommunulæknarnir havt 15.000 viðtalir. Talan er sostatt um einar 50 viðtalir á hvørjari vakt og av teimum eru helvtin avgreiddar umvegis telefonina.

- Hendan skipanin ber í sær, at sum heild hava kommunulæknarnir nógv færri vaktir og fáa sostatt arbeitt nógv meiri í vanligari viðtalutíð um dagin.

- Og akkurat tað var endamálið við skipanini, leggur hann afturat.

Hann sigur, yngri læknar hava ongan áhuga í at gerast kommunulæknar, tá ið kvøld- og náttarvaktirnar verða ov nógvar.

- Hinvegin staðfestir hann eisini ein triðingur av kommunulæknarnir eru skiftandi, fremmandir vikarar, sum ikki kenna landið og samskiftismøguleikarnar nóg væl.

Og ein avleiðing av tí, er, at ov nógvir sjúklingar verða sendir til læknavaktina á Landssjúkrahúsinum.

- Ov nógvir sjúklingar í øllum meginlandinum verða noyddir at koyra á Landssjúkrahúsið til læknavaktina har og tað er ein partur av skipanini, sum ikki virkar nóg væl.

## Koyrandi vaktir brúkast meir

Hans Pauli Strøm sigur, at umframt læknavaktina á Landssjúkrahúsinum, eru koyrandi bakvaktir, men tær verða ikki brúktar í nóg stóran mun.

Hann sigur, at tað er eitt brek, sum arbeitt verður upp á at rætta, so at fólk í størri mun kunnu møta hjá kommunulækna úti í økinum, eitt nú á Klaksvíkar sjúkrahús, ístaðin fyri at noyðast at koyra á Landssjúkrahúsið.

Hann sigur eisini, at tey hava alla tíðina havt eftirmetingar og hava tikið allar tær óhepnu hendingarnar, sum hava verið, til eftirtektar og hava rættað tey brek, sum hava verið.

Fleiri tinglimir vísti á, at hóast skipanin er ein bati fyri læknarnar, er talan um eitt afturstig fyri sjúklingarnar kring landið og teir vónaðu, at tey brekini eisini verða rættað.

## Læknarnir rýma

Kortini var víst á, at tað var neyðugt at seta hesa skipanina í verk fyri at kommunulæknarnir ikki skuldu rýma og so høvdu vit ongar kommunulæknar, tí ongin lækni tímir at hava vakt annaðhvørt, triðjahvørt, ella í besta føri, fjórðahvørt samdøgur.

Sostatt hevur nýggja vaktarskipanin beinleiðis samanhang við trotið á lommunulæknum, tí varð skipanin ikki sett í verk, er ongin sum helst ivi um, at teir kommunulæknar, sum eru eftir, høvdu eisini rýmt.

Og afturfyri er so tænastan í vanligari viðtali um dagin munandi batnað, tí læknarnir arbeiða ístaðin fyri at avspáka fyri kvøld og náttarvaktir.

# Vil tryggjast ímóti føroyskum hólgum

**Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, skal nú greiða frá, hvussu hann ætlar at tryggja okkum ímóti, at útlendingar ólógliga eiga fiskiskip í Føroyum**

HÓLGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit eiga at tryggja okkum ímóti, at útlendingar ikki ólógliga eiga fiskiskip í Føroyum.

Tað heldur Kári P.Højgaard. løgtingsmaður fyri sjálvstýrisflokkinum.

Og nú fer hann at spyrja Tórbjørn Kacobsen, landsstýrismann í fiskivinnumálum, hvussu hann ætlar at tryggja okkum ímóti, at føroyskir vinnulívsmenn í veruleikanum ikki eru annað enn hólgar, ella strámenn, fyri útlendskan stórkapital.

- Hvørji stig fer landsstýrismaðurin at taka fyri at tryggja, at tað veruliga, og ikki bara á pappírinum, eru føroysk áhugamál, ið standa aftanfyri íløgur í føroysk fiskifør?

Hetta er tann einfaldi spurningurin, sum Tórbjørn Jacobsen skal svara í Løgtinginum í næstum.

Kári P. Højgaard sigur, at seinastu árini er íløgupeningur í føroysk fiskiskip í alt størri mun fingin til vega við pengum uttanlands.

Hinvegin sigur lógin um vinnuligan fiskiskap púra greitt, at útlendingar kunnu ikki eiga meira enn ein triðing av parta- og ábyrgdarpeninginum í føroyskum fiskiskipum.

Kortini vísir løgtingsmaðurin á, at í november 2006 kom ein samd landsstýrismálanevnd til ta niðurstøðu, at kanningin, sum Fiskimálaráðið ger tá skip skifta eigara, tryggjar ikki, at ásetingin um, at útlendingarbara kunnu eiga ein triðing av skipunum, verða hildnar.

Hann staðfestir, at Føroyar eru fiskivinnutjóð og búskapurin hvílir í stóran mun á fiskiríkidømið í havinum kring Føroyar og í teimum fiskivinnuavtalum, vit hava við onnur lond.

- Nýggi landsstýrismaðurin, Tórbjørn Jacobsen, hevur boðað frá gjøgnumskygni í samband við umsitingina av fiskidøgum. Tað má eisini verða gjøgnumskygni í eigaraviðurskiftunum, so at vit fáa at vita, um fiskiríkidømi í havinum kring Føroyar veruliga er ogn føroya fólks, soleiðis sum lógin um vinnuligan fiskiskap sigur, ella um tað í veruleikanum eru útlendingar, sum eiga ein stóran part av tí og bara hava hólgar í Føroyum at umsita tað fyri seg, sigur Kári P. Højgaard.